dugni

**Sjálvsognarstovnurin Dugni**

MÓTTIKIÐ
28. NOV. 2012

**Viðtøkur**

## § 1
## Navn, heimstaður og endamál

*Stk. 1.* Navn stovnsins er Dugni.

*Stk. 2.* Dugni er skipaður sum sjálvsognarstovnur við heimstaði í Tórshavnar kommunu og við deildum umkring landið.

*Stk. 3.* Endamál stovnsins er at vera arbeiðstarnaðum til hjálpar við framleiðslu og annars at hjálpa avlamnum til arbeiðis soleiðis:

a) at royna arbeiðsevnini hjá arbeiðstarnaðum við atliti til meting um møguleikar (arbeiðs-/vinnuroyndir) hjá tí einstaka at arbeiða,
b) at menna arbeiðsmøguleikarnar hjá arbeiðstarnaðum sum heild,
c) at skipa fyri arbeiðsvenjing, endurútbúgving og umskúling, so vinnutarnað aftur kunna fara til arbeiðis,
d) at skipa fyri fakligari útbúgving handaliga ella bókliga av arbeiðstarnaðum,
e) at skipa fyri vinnuligum vardum arbeiði fyri avlamnum, sum ikki hava førleikan at arbeiða í vanligari vinnu,
f) at stuðla arbeiðstarnaðum at fáa til vega tilfar til at virka og til at avhenda (selja vørur, tey virka).

Henda vinna eigur ikki at geva aðrari vinnu óhóskandi kapping.

## § 2
## Stýrið

*Stk. 1.* Sum leiðsla fyri stovnin verður valt eitt stýri. Stýrið hevur 5 limir. Limirnir verða valdir fyri eitt fýra ára skeið.

*Stk. 2.* Til tess, at ikki allir stýrislimir skulu fara frá samstundis, standa annaðhvørt ár tveir og annahvørt ár tríggir stýrislimir fyri vali. Stýrislimir kunnu verða afturvaldir.

*Stk. 3.* Limirnir verða valdir soleiðis, at landsstýrismaðurin í almannamálum velur allar limirnar.

Um stýrislimir taka seg úr stýrinum mitt í einum valskeiði, skulu nýggir limir veljast beinanvegin. Teir limir, sum soleiðis hava tikið við, sita til valskeiðið er úti.

*Stk.* 4. Stýrið skipar seg sjálvt við formanni og varaformanni.

*Stk.* 5. Nevndarsamsýning kann verða latin sambært galdandi reglum hjá tí almenna, og skulu hesar frammanundan verða góðkendar av avvarðandi stjórnarráði. Samsýningin verður goldin av Dugna. Somuleiðis verða ferðaútreiðslur goldnar sambært alment galdandi reglum.

**§ 3**

**Uppgávur stýrsins**

*Stk.* 1. Stýrið er ovasta leiðsla á Dugna. Stýrið virkar fyri, at stovnurin bjóðar út tilboð um førleikamenning í samsvari við endamálsorðing stovnsins.

*Stk.* 2. Stýrið hevur mótvegis landsstýrismanninum ábyrgd av rakstrinum av stovninum, harundir at almennu játtanar- og roknskaparreglurnar verða hildnar.

*Stk.* 3. Stýrið setir og loysir úr starvi stjóran á Dugna.

*Stk.* 4. Stjórin á Dugna setir og loysir úr starvi onnur starvsfólk á stovninum.

*Stk.* 5. Stjórin og stýrið hava skyldu at fylgja almenna setanarpolitikkinum. Stovnurin skal halda tær reglur um løn og setanarviðurskifti fyri starvsfólk á stovninum, sum eru ásettar í lógum, kunngerðum og viðkomandi sáttmálum á arbeiðsmarknaðinum.

**§ 4**

**Starvsskipan stýrsins**

*Stk.* 1. Stýrið kann við starvsskipan áseta gjøllari reglur um útinnan av sínum virki.

*Stk.* 2. Stýrisformaðurin innkallar til fund, tá hann heldur tað vera neyðugt ella eftir áheitan frá stýrislimi.

*Stk.* 3. Stýrisfundur verður hildin minst eina ferð hvønn ársfjórðing.

*Stk.* 4. Formaðurin leiðir fundirnar hjá stýrinum. Um formaðurin ikki er møttur, leiðir varaformaðurin fundirnar.

*Stk.* 5. Stýrið er viðtøkuført tá 4 av 5 limum eru møttir á fundi. Avgerðir verða tiknar við vanligum

atkvøðumeiriluta. Stjórin, sum ikki hevur atkvøðurætt, møtir á stýrisfundi og virkar sum skrivari.

*Stk.* 6. Til at samtykkja avgerð um broyting í viðtøkunum krevst full semja í stýrinum og skulu viðtøkubroytingar góðkennast av landsstýrismanninum í almannamálum.

*Stk.* 7. Avgerðir hjá stýrinum verða skrivaðar í gerðabók, sum skal verða góðkend á næsta fundi. Fundarfrásøgn verður send limum og varalimum.

## § 5
## Stjóri

*Stk.* 1. Stjórin er dagligur leiðari av stovninum og stendur fyri dagligu fyrisitingini, herundir umsiting av fíggjarligu játtanini á løgtingsfíggjarlógini.

*Stk.* 2. Stjórin skal ansa eftir:

a) at fíggjarætlanin, sum stýrið hevur góðkent, verður hildin

b) at virksemi stovnsins fer fram eftir galdandi reglum

c) at umstøðurnar til at fremja virksemi stovnsins eru fullgóðar

d) at virksemi stovnsins annars er í samsvari við almennar ásetingar, viðtøkur stovnsins og ávísingar frá stýrinum.

*Stk.* 3. Stjórin ger stýrinum uppskot til virkisskrá fyri komandi árið. Við árslok gevur stjórin stýrinum skrivliga frágreiðing um virksemi stovnsins farna árið.

*Stk.* 4. Stjórin skal virka fyri góðum samstarvi millum stovnin, almennar myndugleikar, vinnulív o.o., fáa í lag gott samstarv millum starvsfólk, leiðslu, starvsbólkar sínámillum til gagns fyri virksemi stovnsins.

## § 6
## Roknskapur, grannskoðan o.a.

*Stk.* 1. Í roknskaparviðurskiftum eru reglurnar um almenna roknskaparhaldið galdandi.

*Stk.* 2. Roknskaparárið er álmannakkaárið.

*Stk.* 3. Stýrið velur løggildan grannskoðara.

*Stk.* 4. Roknskapur stovnsins skal setast upp í tveimum:

a) ein serskiltur roknskapur verður gjørdur fyri játtanina, sum landsstýrismaðurin útvegar stovninum til alment góðkent virkssemi og

b) ein serskiltur roknskapur fyri virksemi, sum ikki kemur undir pkt. a).

*Stk.* 5. Grannskoðaður roknskapur og grannskoðarafrágreiðing verða á hvørjum ári send landsstýrismanninum.

**§ 7**

**Ársaðalfundur**

Stk. 1. Í seinasta lagi innan 3 mánaðir eftir lokið roknskaparár verður ársaðalfundur hildin, við hesi dagsskrá:

a) Frásøgn stýrisformansins frá virki stovnsins í farna ári

b) Framløga av grannskoðaðum ársroknskapi til góðkenningar

c) Framløga av rakstraræetlan fyri komandi ár til góðkenningar

d) Val av grannskoðara

**§ 8**

**Tekningarrættur**

*Stk.* 1. Heimild at skriva undir og binda stovnin hava stjórin og stýrisformaðurin í felag.

*Stk.* 2. Sjálvsognarstovnurin Dugni kann ikki binda landskassan við at upptaka lán ella veðseta.

*Stk.* 3. Ognir stovnsins kunnu bert verða nýttar til at fremja endamál stovnsins. Rakstrarpeningur skal, neyðugur kassapeningur undantikin, á tryggan hátt setast í peningastovn.

**§ 9**

**Avtøka**

*Stk.* 1. Avgerð um at avtaka sjálvsognarstovnin Dugna verður tikin av stýrinum, eftir skrivligari tilsøgn frá landsstýrismanninum sbrt. § 4, stk. 6

*Stk.* 2. Verður sjálvsognarstovnurin Dugni avtikin, verða ognir stovnsins at nýta til líknandi endamál eftir avgerð landsstýrismansins.

dugni

## § 10
## Gildiskoma

*Stk.* 1. Hesar viðtøkur hava gildi frá 1. juli 2012.

*Stk.* 2. Samstundis sum hesar viðtøkur verða settar í gildi fara áður galdandi viðtøkur úr gildi.

---ooOoo---

Tórshavn, tann 24 / 9 2012

Stýrislimir:

Jóhan Samuelsen

Karin Kjølbro

Ása Olsen

Esther Dahl

Ernst Jacobsen

Landsstýrismaðurin í almannamálum:

Annika Olsen

styrkir tínar arbeiðsførleikar